# at nøkta orkutørv



Magni Laksafoss hevði sera áhugaverdan fyrilestur um oljutilgongdina úti og heima og vísti á, at 94% av føroyska orkubrúkinum stavar frá olju

Mynd Jan Müller




Eisini Richard Hardmann, jarðfrøðingur hevði áhugverdan fyrilestur um orku

Mynd Jan Müller



aðrastaðni í so mong ár, má gera sær greitt, hvønn orkupolitikk man ætlar sær at reka í framtíðini.

Magni Arge heldur eisini, at var tað nakað, sum kom so greitt og týðliga fram frá fyrilestrarhaldarunum, so var tað sannroyndin, at vit eru so bundin at oljuni sum orkuveitari, ja so nógv meira bundin enn nógv flest onnur samfeløg eru. Tí var tað eisini sera hugaligt at síggja bæði SEV, Seawave og Røkt og eisini onnur initiativ, sum Súsanna Sørensen greiddi frá, og sum øll bera á tað borðið, at man hyggur eftir, hvussu vit kunnu minka um okkara binding at olju og fáa aðrar viðvarandi orkukeldur at virka í Føroyum.

Hann heldur, at tað var eisini áhugavert at hoyra um støðuna í Danmark viðvíkjandi vindmyllum og um støðuna í Íslandi. Hvat Ísland viðvíkur, so eru teir í eini heilt aðrari støðu, ja nærum eini heilt øðrvísi støðu enn vit. Teir hava ríkiligt av nærum ókeypis orku, meðan vit mugu keypa hana so gott sum alla.

## Krystallklár mynd

Myndin, sum varð málað á veggin á ráðstevnuni, var tí púra greið og krystallklár fyri Magna Arge: – Tú skal ikki rokna við, at oljuprísurin fer at lækka í framtíðini. Hann fer at vera relativt høgur og kanska bara at hækka uppá longri sikt, um annars eftirspurningurin fer at standa við. Tað verður ein byrða fyri føroyska samfelagið, sum er so heft at oljuni. So vit hava tørv á antin at útbyggja viðvarandi orku munandi ella at finna oljuna sjálvir, soleiðis at vit fáa eina javnvág í okkara oljunýtslu og framleiðslu. Groft sagt kann man siga, at annaðhvørt finnur tú oljuna og harvið fær tú stórar inntøkukeldur í Føroyum, ella finnur tú ikki oljuna, og so fær tú stórar útreiðslur og stórar trupulleikar at fáa vælferðina at hanga saman.

## Saknaði politikarar

Magni Arge metir tí, at hetta var ein øgiliga spennandi og tankavekjandi ráðstevna. Hann heldur tað kanska var spell, at tað ikki vóru fleiri politikarar og fólk frá umsitingini og fjølmiðlaverðini við á ráðstevnuni, tí hetta er av sera stórum almennum áhuga og týdningi, og kanska nógv meira enn bara spurningurin um at finna olju - nevniliga orkuspurningurin í síni heild.

– Vit hava øll orsøk til at ynskja Statoil bestu eydnuna við teirra leiting í summar og annars teimum, sum ætla sær at leita í føroyskum øki komandi árini.

Magni Arge viðgongur, at tað at fáa at vita, at okkara samfelag er so bundið at oljuni sum hagtølini vísa, ger, at tú verður sera illa við, hóast tú eigur at vita hetta. Tað setur so nakrar týdningarmiklar tankar í gongd, og tí í heldur Magni Arge ikki tað vera grundarlag fyri at seta spurnartekin við, um tað var rætt at taka spurningin um orkuveiting og alternativar orkumøguleikar við í eina ”Offshore” ráðstevnu. Tvørturímóti var hetta ein skilagóð avgerð heldur hann.